***Richard Mortensen, í altjóða ráðgevarafyritøkuni PA Consulting um komandi føroyska oljuvinnu:***

# Arbeiðspláss - profitt ella bæði tvey!

*-Hvat vilja vit við eini oljuvinnu. Ynskja vit so nógv arbeiðspláss sum gjørligt ella ynskja vit mest møguligan profitt ella kanska eina blanding av báðum tveimum? Spyr Richard Mortensen, ráðgevi, sum heldur, at føroyingar nú beinan vegin eiga at seta sær ein málsetning fyri eini komandi oljuvinnu og síðani leggja eina arbeiðsætlan.*



*Richard Mortensen, ungur føroyskur ráðgevi, sum arbeiðir í altjóða ráðgevarafelag heldur, at teirra royndir í oljuvinnuni kunnu koma føroyingum til góðar.*



*Richard Mortensen tosar við Arna Olafson á oljuráðstevnuni herfyri*

Millum tey mongu, sum høvdu leitað sær á oljuráðstevnuni í Havn herfyri var eisini Richard Mortensen av Argjum. Hann arbeiðir í dag sum ráðgevi hjá eini av heimsins størstu ráðgevarafyritøkum "PA Consulting" í Keypmannahavn.

Fyritøkan, sum er ensk, arbeiðir kring allan heimin, og hevur m.a. tikið sær nógv av uppgávum í sambandi við oljuvinnu. Hvønn dag arbeiðir umleið 100 av teimum 3000 ráðgevunum hjá fyritøkuni við oljuspurningum. Her er talan um ikki minni enn 4000 ymsar verkætlanir frá Miðeystri til New Foundlands og eisini til Hetlands.

Eitt nú hevur fyritøkan gjørt nógv arbeiði fyri Statoil og Mærsk. Richard Mortensen heldur fyri, at tann nógva vitanin, sum teir hava fingið við at arbeiða innan oljuvinnuna, nú kann koma Føroyum til góða. Hann dylur heldur ikki fyri, at júst tað at hann er føroyingur og kennir til føroysk viðurskifti, kann vera ein stórur fyrimunur fyri eina komandi føroyska oljuvinnu.

## Málsetningurin

Men hvat hevur hann so at siga sum ráðgevi til spurningin ein komandi føroysk oljuvinna! Hvussu eiga vit at handfara hetta stóra málið og hvønn setning eiga vit at seta okkum?

Richard Mortensen:

Eg haldi, at tað, sum er mest umráðandi hjá føroyingum, er at seta seg saman og tosa um spurningin. At finna fram til eina málsetning, áðrenn tú fert í gongd við eina arbeiðsætlan.

Her mugu vit til at gera okkum greitt, hvat vit hava brúk fyri eitt nú, hvørja kritiska vitan tørvar okkum longu nú! Vit mugu leggja til rættis eitt slag av vitanstrategi. Og áðrenn vit fara undir sjálva arbeiðsætlanina (handlingsplan) so mugu vit hava ein málsetning. Har eigur at verða spurt: hvat vilja vit við eini komandi oljuvinnu í Føroyum? Er tað at fáa sum nógv arbeiðspláss sum gjørligt ella er tað profittmaksimering, t.v.s. at fáa sum mest av pengum burtur úr, sum vit ynskja?

Ella kanska eina samantvinnan av báðum tveimum!

Richard Mortensen heldur, at tað er sera gott at fáa eitt orðaskifti um allan spurningin longu nú og er

→



*Frá oljuráðstevnuni. Her líða fleiri av fundarluttakarunum á, hvat løgmaður at enda hevði at siga. Mynd jan*

→

hann sera fegin um at hava verið við á oljuráðstevnuni. Eg haldi tað er sera umráðandi, at vit tosa opið út um allar spurningarnar nú, soleiðis at vit kunnu fáa tey røttu kortini á hondina longu nú, tá vit skulu til at samráðast við oljufeløgini og ymsar myndugleikar

Hann leggur afturat, at fáa vit ikki hetta upp á pláss nú, so er tað ov seint at tosa um at leggja eina strategi um, hvat vit vilja við oljuni, um eini 5-6 ár

## Lærið av fiskivinnuni

Hann heldur, at henda støðan lættliga kann samberast við gongdina í føroysku fiskivinnuni

-Høvdu vit longu í 60-unum, tá flakavinnan tók seg upp, sett okkum niður og spurt, hvat vit vildu við hesi vinnu - at fáa so nógv arbeiðspláss sum gjørligt ella við sunnari kapping at fáa sum mest av profittinum burtur úr, so høvdu vit kanska ikki verið í tí støðu vit eru í í dag.

Richard Mortensen leggur aftrat, at í dag eru vit noydd at gjalda tann dýra lærupeningin fyri hesa manglandi tilrættalegging. Høvdu vit sett út í kortið tá ein málsetning, so høvdu vit helst kunna verið nógvar av teimum ótespiligu avgerðunum nú fyriuttan

## Alternativa vinnu

Hann sigur víðari, at vit mugu eisini gera okkum greitt, at fáa vit eina oljuvinnu, so hevur hon avmarkaða lívstíð. Tí eiga vit úttan mun til, hvat oljan gevur, alla tíðina at byggja og menna alternativan ídnað við síðuna av oljuni. Oljupengarnir eiga m.a. at verða nýttir til hetta.

Men hvat meinar hann við, tá hann brúkar orðið málsetning?

-Her hugsi eg um, hvat vit vilja hava av virksemi í landinum. Hvørjar íløgur skulu gerast. Hvørjar skattalógir, hvønn ídnaðarpolitik og hvønn strategi vit vilja leggja í heila tilkið. Alt hetta fer so at gera okkum nógv betri førar fyri at standa á egnum beinum og tað fer at gera tað munandi lættari at hava samráðingar við oljufeløgini og onnur

Richard Mortensen heldur, at vit nú eiga at seta ferð á, soleiðis at vit eru komnir á pláss, tá tann fyrsta oljan kemur upp. Júst tí er tað so umráðandi longu nú at seta sær spurningar sum: hvat vilja vit við oljuvinnuni - hvat ambitiónsstøði skulu vit leggja okkum eftir, hvørja vitan skulu vit skaffa okkum osfr.

Richard vísir á, at teir m.a. hava ráðgivið norsku Statoilfyritøkuni øll hesi seinastu 16 árini og hava harvið fingið sera drúgvar royndir við m.a. at fáa tann rætta infrastrukturin, tey røttu fólkini á rætta stað, tey røttu venjingarprogrammini og tann rætta bygnaðin, soleiðis at fyritøkan kann vera kappingarfør.

## Faið tað kommerciella við

Richard Mortensen heldur annars, at vit mugu ansa eftir at kjakið um oljuvinnuna ikki verður og akademiskt og vísindaligt. Vit mugu eisini fáa tann kommerciella partin við í kjakið.

Nú er hann so farin aftur til Keypmannahavnar við nógvum hugskotum og ikki minst kontaktum bæði í Føroyum og í útlandinum. Richard Mortensen heldur, at tað er og verður sera áhugavert og avbjóðandi at arbeiða við eini komandi føroyskari oljuvinnu. Hann heldur eisini, at tað fyri føroyingar kann vera ein stórur fyrimunur at brúka eina ráðgevarafyritøku sum teirra, tí teir eru fullkomiliga óheftir av oljuáhugamálum og líggjarligum áhugamálum.

jan




